**12 síður við bókaprátum, ummælum og umrøðum av skaldsøgum, barnabókum, bókakjaki, søgubókum og krimibókum**




Rakel Helmsdal fekk íblástur til bøkurnar »Úr Mosakulluni 1 og 2« frá spákitúrum í Hoydølum

Mynd: Jens Kristian Vang

# Sniffilin Nói á nýggjum ævintýrum

**Onnur bók í røðini um sniffilin Nóa er nú komin út.**
**Fyrra bókin varð sera væl móttikin, og nógv hava glett seg at lesa meir um ævintýrverðina hjá Rakel Helmsdal**

BÓKMENTIR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Bøkurnar hava felagsheitið *Úr Mosakulluni*. Fyrra bókin var *Várferðin til brúnna*, og hendan hevur heitið *Veturin hjá Undu.*

Mosakullan er holan hjá lítla dýrinum Nóa, har hann helst vil verða verandi, men noyðist ferð eftir ferð út á ævintýr fyri at hjálpa neyðstøddum.

– Eg fekk hugskotið til hesar bøkurnar, tá eg spákaði til arbeiðis, greiðir Rakel Helmsdal frá.

Dalurin, har søgurnar fara fram, er ein dalur sera líkur dalinum, sum Rakel spákaði í, nevnliga Ovari Hoydalur.

Søgurnar um ævintýrkendu verurnar og dýrini eru íspunnar. Høvuðspersónurin Nói er ein sniffil. Sniffil merkir smádýr. Vinirnir hjá Nóa eru sveim, fuglalíkir skapningar við menniskjakroppi, og ein ketta við veingjum.

**Lesa fyri børnunum**

Í bókaklubbanum hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags, er málbólkurin børn í aldrinum fimm til sjey ár, men Rakel sjálv heldur, at málbólkurin er nógv størri enn so, og eins nógv er tey tvey til ellivu ára gomlu.

– Hetta eru bøkur, sum foreldrini skulu lesa fyri børnunum. Soleiðis havi eg hugsað, tá eg havi skrivað tær, sigur hon.

Edward Fuglø hevur myndprýtt bøkurnar.

– Eg eri so heppin, at eg og Edward hava sama myndamál í høvdinum. Tí samstarva vit sera væl, og hansara myndir av mínum verum eru júst so, sum eg havi ímyndað mær tær, greiðir Rakel frá.

Sniðið á bókunum er gamaldags. Kapitlarnir byrja allir við “Har ið ...”, skrifttypirnar eru í gomlum sniði, og bókaband er í seinnu bókini.

Ferðin hjá Nóa minnir ikki sørt um bøkurnar hjá Tolkien og Tove Jansson. Rakel sigur, at hon fær nógvan íblástur frá øllum tí, hon lesur.

Ætlanin er at skriva í hvussu so er tvær bøkur aftrat um sniffilin Nóa.

– Nú havi eg skrivað um ferðir hansara á vári og vetri, so nú má eg skriva um summarið og heystið eisini, sigur Rakel.

Nakra tíðarætlan hevur hon tó ikki. Tað veldst um, hvat hon fæst við annars, og um stuðulin er til staðar.

***»Inspiratión er fyri dovin fólk«***
***Rakel Helmsdal***

## Í uppskoti til virðisløn

Fyrsta bókin um sniffilin Nóa, *Várferðin til Brúnna,* er nú í uppskoti at vinna barna-og ungdómsbókavirðisløn útnorðurráðsins.

Í grundgevingini fyri at tilnevna bókina verður millum annað sagt:

»Bókin er ein sonn fragd fyri eygu og oyru, skrivað við einum inniligum tóna, sum egnar seg væl til at lesa upp fyri smáum børnum. Samstundis er søgan myndprýdd av einum av fremstu listafólkum okkara, Edward Fuglø.

Sjálvt um persónarnir eri íspunnir, snýr bókin seg í størstan mun um teg og meg. Um tað. at vera menniskja og um at vera bangin fyri tí ókenda og fremmanda. At sjálvt um tú ert lítil og bangin, kanst tú gott vera djarvur. Og at tað, tú ert bangin fyri og heldur er vandamikið, ofta vísir seg at vera tað beint øvugta«

Hinar bøkurnar, ið eru í uppskoti, er íslendska *Garðurinn*, eftir Gerður Kristný og grønlendska *Sila* eftir Lana Hansen. Hetta er fimtu ferð, at barna- og ungdómsbókavirðisløn útnorðurráðsins á 60.000 krónur verður latin.

